TRYGGING OG EFTIRLØN

Havnar arbeiðskvinnufelag

Havnar Arbeiðkvinnufelag

Bøgøta 10
Postboks 161
FO 110 Tórshavn

tel. 35 39 95
Faks. 319738

Forkvinna:
Vígdis Johannesen
Fartel. 21 39 95

Heimasíða: www.hak.fo
Teldupostur: hak@hak.fo
hak@bokhald.fo

opið er:
mánadag - fríggjadag kl. 10.00 - 15.00
týsdag kl. 13.00 - 19.00

Rita inn á liv.fo

Sum kundi hjá LÍV ritar tú inn við at nýta P-tal og loyniorð, sum vit hava sent tær í brævi.

Tá tú ritar inn fyrstu ferð, verður tú biðin um at skráseta teldubústað og fáa tær títt egna loyniorð. Eftir hetta fært tú ein teldupost frá okkum, sum váttar nýggja loyniorðið.

Teldubústaðurin verður eisini brúktur, um tú gloymir títt loyniorð.

Innihaldsyvirlit

Almennar treytir

Innliman 5
Kundaportalurin 6
Hægri veiting 8
Afturkeyp 8
Skattur 9
Almennar tryggingartreytir 9
Úr starvi / farloyvi 10
Framhaldsstrygging 10
Gjaldsskái 10
Hvílandi trygging 11
Í farloyvi 11
Gjaldsundantøka 11

Trygging

Nær fært tú útgjald 13
Við deyða 13
Ávísar Hættisligar Sjúkur 13
Upphæddir 14

Eftirløn

LÍVPensjón 17
Avkast og íløgur 18
Íløguumsiting 18
Útgjald 20
Við deyða 20

Ráðgeving

Kundaportalurin 23
Ráðgevar 24

Almennar treytir

Innliman

Havnar Arbeiðskvinnufelag bjóðar limum sínum trygging og eftirløn í samstarvi við Tryggingarfelagið LÍV.

Avtalan er galdandi fyri virknar limir og kemur í gildi, tá ið tú byrjar í starvi og um tú ert fult arbeiðsfør/ur.

Legg tó til merkis, at limir undir 18 ár, ikki eru fevndir av samlagstryggingini hjá felagnum.

Tryggingin fer úr gildi mánaðin eftir, at tú fyllir 67 ár, ikki longur er virkin limur, ella fer úr starvi. Tó ber til at halda fram í tryggingini eftir avtalu við felagið.

Limir hava atgongd til Kundaportalin hjá LÍV, ið m.a. vísir, hvat er inngoldið, hvørji rættindi tú hevur og hvussu gongdin er. Loyniorð og vegleiðing verður send í samband við innliman.

Kunda-portalurin

Á kundaportalinum fært tú skjótt og greitt yvirlit yvir øll tíni viðurskifti í sambandi við eftirløn og trygging.

Skalt tú innrita, far inn á liv.fo og trýsta á logga á kundaportal niðast í vinstra horni á síðuni. Fyri at logga á, skalt tú nýta títt p-tal og tað 9-siftaða loyniorðið, ið tú fært sendandi við brævi frá Lív.

Tá ið tú innritar fyrstu ferð, verður tú biðin um at skráseta teldubústað og fáa tær títt egna loyniorð. Teldubústaðurin verður brúktur, gloymir tú loyniorðið.



MÍTT LÍV

Stillingar Samskifti Logga av

Inngjøld TAKS Samskifti

ar í dag | Persónligar tryggingar | Teknisk uppgerð

lit

Persónligar tryggingar

- [redacted]
- [redacted]
- [redacted]

ið eftirlønaraldur	Við óarbeiðsføri	Útgjald við deyða
r. [redacted]	kr. 0,-	kr. [redacted]
r. 0,-	kr. [redacted]	kr. 0,-
r. 0,-		kr. 0,-

liga umfatað ar av gjaldsundantøku – hygg á ta einstøku tryggingina
ging er fevnd av gjaldsundantøku.

ættislig sjúka	Hættislig sjúka børn
r. 0,-	kr. 0,-

enn skatt og avgjøld. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum villum.
u samanteljingar av øllum galdandi tryggingum. Trýst á upphæddirnar fyri neyvari

Hægri veiting

Ætlar tú tær at tekna hægri trygging, enn hana, ið fakfelagið hevur gjørt avtalu um, kanst tú tekna eina einstaklingatrygging. Tá verður upphæddin, ið liggur oman fyri avtalaðu upphæddina, teknað eftir teimum ásetingum, sum galda fyri einstaklingar.

Afturkeyp

Sambært Eftirlønarlógini, ið kom í gildi 1. januar 2014, ber ikki til at fáa samansparda virðið av inngjøldum aftur í úrtíð. Samansparingin er bundin til pensjónsaldur. Inngjøld, sum eru flutt fyri 1. januar 2014, kunnu hava aðrar ásetingar, og fylgja upprunaligu eftirlønaravtaluni og Rentutryggingarlógini.

Skattur

Eftirlønargjaldið er eftir 1. januar 2012 skattað við inngjald. Tað ger, at øll tryggingar- og eftirlønargjøld eru skattafrí.

Almennar tryggingar-treytir

Umframt ásetingarnar, sum sáttmálin við Lív fatar um, koma allar eftirlønartryggingarnar undir almennu tryggingartreytirnar hjá Lív frá 22. juni 2012 ella undir „Tryggingartreytir fyri ávísar hættisligar sjúkur" frá 1. januar 2014, lóg um tryggingaravtalur, Eftirlønarlógina ella aðrar reglur í galdandi lógum.

Úr starvi/ farloyvi

Framhaldstrygging

Fert tú úr skipanini, ber til at tekna eina persónliga framhaldstrygging við somu upphæddum ella lægri enn frammanundan. Neyðugt er ikki at lata okkum nýggjar heilsuupplýsingar í hesum sambandi.

Hendan framhaldstrygging skal verða teknað í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at tú ert farin úr skipanini.

Gjaldið fyri ta persónligu tryggingina verður ásett eftir tínum aldri, tá ið nýggj trygging verður teknað.

Nýggi arbeiðsgevarin kann eisini halda fram at rinda til skipanina.

Gjaldsskái

Um inngjaldið steðgar t.d. í sambandi við farloyvi, verður gjaldskái latin í tilsamans eitt ár við somu trygging sum frammanundan.

Gjaldið fyri tryggingina verður tá mótroknað í uppsparda virðinum á tínari eftirlønartrygging, og gjalsskái kann ikki verða givin longur enn dekningur er fyri í uppsparda virðinum.

Hvílandi trygging

Vilt tú ikki hava gjaldsskáa, kanst tú velja hvílandi trygging, og skal tað verða fráboðað LÍV.

Tá ið tú hevur havt gjaldsskáa í 1 ár, fer tryggingin í hvílistøðu. Sostatt hevur tú ikki longur trygging við deyða, hættisliga sjúku ella óarbeiðsføri.

Eftirlønin heldur tó fram at savna rentu og verður útgoldin við eftirlønaraldur.

Í farloyvi

Fert tú í farloyvi við ongari løn, ber til at halda fram við tryggingini fyri egna rokning. Tað skal tó verða avtalað við fakfelagið í hvørjum einstøkum føri.

Gjaldsundantøka

Verður tín arbeiðsorka skerd 2/3, fært tú gjaldsundantøku eftir trimum mánaðum. Útgoldið verður so leingi sum tú ikki hevur førleika at arbeiða og ert á lívi. Um neyðugt, verður goldið heilt fram til eftirlønaraldur. Upphæddin, sum LÍV rindar er tann sama, sum tú rindaði, tá ið gjalds-undantøkan byrjaði.

Við gjaldsundantøku er tryggingin henda:

- Eftirlønarinngjald til tú ert 67 ár
- Samlagstrygging í 3 ár

Trygging

Nær fært tú útgjald?

Við deyða

Tryggingin veitir útgjald um tú doyrt av sjúku ella vanlukku, áðrenn tú ert 67 ár. Tryggingin er galdandi bæði í arbeiði og frítíð.

Veiting við deyða verður útgoldin til næsta avvarðandi. Ynskist veitingin útgoldin til onnur enn næsta avvarðandi t.d. sambúgva, skal tað verða fráboðað LÍV skrivliga.

Tryggingin verður útgoldin uttan um búgvið og uttan um møgulig ognarkrøv.

Ávísar hættisligar sjúkur

Við hesi trygging fært tú rætt til útgjald, um tú ella barn títt fær staðfest eina ávísa hættisliga sjúku. Á www.liv.fo sæst nærri lýsing um hvøjar sjúkur ella sjúkraviðgerðir talan er um.

Upphæddir

Samlagstrygging

Trygging við deyða:

• 18 - 50 ár	kr. 200.000
• 51 - 59 ár	kr. 175.000
• 60 - 66 ár	kr. 150.000

Ávísar hættisligar sjúkur:

• Ávísar hættisligar sjúkur, limir	kr. 100.000
• Ávísar hættisligar sjúkur, børn	kr. 100.000

Eftirløn

5,5%

LÍVPensjón

Sambært sáttmála rindar arbeiðsgevarin til persónliga eftirløn. Eftirlønin er eitt trygdarnet, sum skal geva tær eina fíggjarliga tryggari tilveru sum pensjonistur eftir eitt virkið lív á arbeiðsmarknaðinum. Somuleiðis er eftirlønin fíggjarlig trygd við deyða ella óarbeiðsføri fyri eftirlønaraldur.

Tín eftirløn verður sett í LÍVPensjón, ið hevur lágan umsitingarkostnað, einans 5,5% av inngjaldinum umframt 300 kr. árliga.

10

Marknaðarrenta

Avkast og íløgur

LÍVPensjón veitir marknaðarrentu. Tað merkir, at tín samansparing er sett í partabrøv og lánsbrøv, ið fáa tína samansparing at vaksa sambært gongdini á virðisbrævamarknaðinum, sí mynd omanfyri.

Íløguumsiting

Íløgustrategiin hjá LÍV ger, at LÍV hevur enn tann lægsta umsitingarkostnaðin í Føroyum. Heldur enn at nýta kostnaðarmikil íløgufeløg ger LÍV beinleiðis íløgur. Í 2016 var íløgukostnaðurin einans 0,31%.

0,31%

Lívlagað eftirløn

Tá ið 10 ár eru eftir til eftirlønaraldur, verður partabrævagoymslan støðugt niðurskrivað, so at váðin gerst lægri tess eldri tú verður. Býtið millum partabrøv og lánsbrøv verður víst á myndini omanfyri.

15%

Útgjald

Eftirlønin verður útgoldin, tá tú nært eftirlønaraldur, sambært lógini um eftirløn. Ásetingarnar fyri útgjald eru soljóðandi í 2014:

Við deyða

Um tú doyrt áðrenn eftirlønaraldur, verður eftirlønin útgoldin til næsta avvarandi uttan so, at onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV.

- Í minsta lagi 45% av samanspardu eftirlønini skal verða útgoldin sum lívrenta. Lívrentan verður útgoldin mánaðarliga frá tí, at tú fyllir 67 ár og so leingi, tú ert á lívi.
- Í mesta lagi 55% av samanspardu eftirlønini kann verða útgoldið sum lutaeftirløn, ið verður goldin út í eins stórum lutum mánaðarliga í eitt tíðarskeið, sum er minst 10 ár.
- Í mesta lagi 15% av samanspardu eftirlønini kann verða útgoldið sum kapitalútgjald, ið verður goldið út í einum.

Er samlaða eftirlønarsamansparingin minni enn kr. 400.000,– kunnu upp til kr. 60.000,– verða rindað út í einum, og restin verður goldið út við upp til kr. 2.500,– um mánaðin, til alt er útgoldið.

Lívrenta
Minst 45%

Lutaeftirløn
Mest 55%

Kapitalútgjald
Mest 15%

Í minsta lagi 45% av samanspardu eftirlønini skulu verða útgoldin sum Lívrenta. Hetta verður goldið út mánaðarliga, frá tú fyllir 67 ár, og so leingi tú ert á lívi.

Í mesta lagi 55% av samanspardu eftirlønini kunnu verða útgoldin sum Lutaeftirløn, ið verður goldin út í eins stórum lutum mánaðarliga í eitt tíðarskeið, sum er minst 10 ár.

Í mesta lagi 15% av samanspardu eftirlønini kunnu verða útgoldin sum kapitalútgjald, ið verður goldið út í einum.

Tríggir partar

Galdandi eftirlønarlóg gevur tær møguleika at býta tína pensjón í tríggjar partar, tá útgjaldið byrjar: Lívrenta, Lutaeftirløn og Kapitalútgjald.



Ráðgeving

Kunda-portalurin

Ert tú í iva um okkurt, ella vilt hava meir at vita, set teg í samband við LÍV. Á heimasíðuni sært tú, hvørjar deildir og hvørji starvsfólk eru. Ring ella send ein teldupost beinleiðis til ein av ráðgevunum.

Á kundaportalinum sært tú, hvussu tín eftirløn er samansett, og hvørjar tryggingar, tú hevur. Tú fært eisini fylgt við inngjøldum og útgjøldum, umframt, at brævasamskiftið frá Lív er tøkt her.

Tað er her, at tú fært eitt skjótt og greitt yvirlit yvir øll tíni viðurskifti.

Ráðgevar

Trygginarráðgevi
Tel. 21 19 50
dan@liv.fo

Trygginarráðgevi
Tel. 23 11 19
solva@liv.fo

Tryggingarráðgevi
Tel. 23 11 18
tommy@liv.fo

Tryggingarráðgevi
Tel. 21 14 13
gunnvor@liv.fo

Sáttmálin millum LÍV og avvarandi felag verður javnan dagførdur og skal tí fyrivarni takast fyri villum og broytingum. Dagførdar treytir og veitingar eru at finna í galdandi sáttmála. Almennar tryggingartreytir vera eisini javnan dagførdar, og eru nýggjastu dagføringarnar at finna á www.liv.fo.

Web-faldari: Vers.01.01.18

Kopargøta 1
P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 31 11 11
Fax +298 35 11 10
www.liv.fo
liv@liv.fo

norna.fo 51 2002